## Fiska leyvuna í Atlantshavinum

Nú verður aftur tíð at fara á flot við tí stóru tráðuni. Rammurnar eru nøkulunda tær somu sum í fjør, so kappingin byrjar 1. november 2008, og síðsti fiskidagur er 1. mars 2009. Eins og undanfarnu ár, er Magni Blástein fyriskipari. Í ár er tað Jógvan Weihe og Bátatænastan sum lata virðislønir. Um kappingina í fjør kann sigast at hon eydnaðist væl. Vinnarin gjørdist Heini Weihe við einum hemara á 196 kg, og næstur honum var Jóannes Gaard við einum hemara á 160 kg. Tann triðtyngsta fekk Johan Simonsen, og vigaði hann 117 kg. Hemarin - Løvan í atlantshavinum - liggur ofta millum 200 og 400 pund og kann gerast yvir tríggjar metrar langur.



# Annika Olsen vil hava gongd á Eysturoyartunnilin sum skjótast

**- Undirsjóvartunnilin ímillum Streymoy og Eysturoy er ein sera áhugaverd verkætlan og eg fari at gera mítt til, at arbeiðið kann byrja sum skjótast, sigur Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Øll eru sera væl nøgd við hendan fyrsta fundin ímillum landsstýrið og felagið aftanfyri Eysturoyartunnilin. Frá vinstru sita, Dávid Reinert Hansen, stjóri í felagnum fyri Eysturoyartunnilin, Rodmundur Nielsen, nevndarlimur, Ingi Højgaard, nevndarformaður, Malena Thomsen, nevndarlimur, Annika Olsen, landsstýriskvinna, Rúni Joensen, aðalstjóri í Innlendismálaráðnum, Kristjan Petersen, stjóri í felagnum fyri Eysturoyartunnilin, Niklas Foldbo nevndarlimur og Bergur í Garði, nevndarlimur*

- Hetta er helst akkurát rætta løtan at fara undir arbeiðið at gera undirsjóvartunnil ímillum Streymoy og Eysturoy.

Tað heldur Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum.

Í gjár var fundur ímillum landsstýriskvinnuna og privata felagið aftanfyri Eysturoyartunnilin fyri at kanna eftir, um útlit framvegis eru fyri at fremja ætlanina á privatum grundarlagi, soleiðis sum tað upprunaliga varð ætlað.

Allir partar eru sera væl nøgdir við fundin, har yvirskipaða niðurstøðan var tann, at privata felagið framvegis er sinnað at fremja ætlanina.

### Annika hevur bóltin

Annika Olsen staðfestir, at eftir fundin við tunnilsfelagið í gjár, liggur bólturin hjá henni.

Men hon ætlar at spæla hann víðari sum skjótast.

- Tað fyrsta, eg nú fari at gera, er at fyrireika málið so at tað kann leggjast fyri ein landsstýrisfund, sigur hon.

Hon væntar ikki, at hon klárar tað til landsstýrisfundin mánadagin, men í øllum førum miðjar hon eftir at leggja tað fyri á landsstýrisfundi næsta mánadag.

Á landsstýrisfundinum fer hon at kunna landsstýrið um fundin við tunnilsfelagið í gjár og endamálið er sjálvandi eisini at fáa tilsøgn til at fara undir samráðingar við tunnilsfelagið um loyvistreytirnar.

Helst skal landsstýrið eisini stinga nakrar yvirskipaðar loyvistreytir út í kortið, sum landsstýriskvinnan fer at samráðast innanfyri.

- Hetta er ikki eitt mál, sum eg ætli at leggjast á, tí fari eg at royna at fáa gongd á samráðingarnar við tunnilsfelagið um loyvistreytirnar sum skjótast, sigur Annika Olsen.

Men nær tað verður, veldst um viðgerðina í landsstýrinum, men hon vónar, at samráðingarnar kunnu byrja skjótt og í øllum førum ætlar hon sjálv, at tað skal verða so skjótt sum gjørligt.

- Hetta er ein verkætlan, sum allir partar eru sinnaðir at fáa gongd á og tí fara vit at bera so skjótt at sum gjørligt.

- Hetta er ein verkætlan, sum hevur stóran, samfelagsligan týdning. Men nú stígur er komin í búskapin, er hetta helst akkurát rætta løtan at fara undir eina slíka verkætlan fyri at varðveita virksemi í landinum.

### Bjartskygdur

Eisini Ingi Højgaard, formaður í nevndini fyri Eysturoyartunnilin, er bjartskygdur eftir fundin við landsstýriskvinnuna.

- Vit løgdu okkara sjónarmið fram og greiddu frá ætlanini, samstundis sum vit váttaðu, at vit framvegis eru sinnað at fremja ætlanina.

Tað, sum tunnilsfelagið nú sær fyri sær, er, at ein tíðarætlan verður løgd fyri samráðingunum um loyvistreytirnar og tað arbeiðið verður farið í holt við nú.

- Landsstýriskvinnan var vælviljað og varð sinnað at taka málið upp beinanvegin, so tað kunnu vit ikki vera annað enn nøgd við, sigur Ingi Højgaard.

## 33,1 millión á muni

Tilsamans komu sjey tilboð inn upp á at byggja ellis-og røktarheimið og økisdepilin fyri sinnisveik í Vági.

**Tilboðini vóru hesi:**

| | |
|---|---|
| TG Verk: | 56,9 mió |
| Víking Smíð: | 63,3 mió |
| HES-Byg: | 63,9 mió |
| Norðhús: | 68,5 mió |
| Articon: | 69,4 mió |
| MT-Højgaard: | 75,0 mió |
| Pihl & Søn: | 90,0 mió |

Kostnaðarmetingin var upp á 65 milliónir, so tað sæst, at trý tilboð eru niðanfyri tað og tvey onnur tilboð eru beint omanfyri. Landsverk, sum er byggiharri, fer nú at meta um tilboðini og fyritøkurnar, sum bjóðað hava og út frá eini heildarmeting verður so tikið av einum av tilboðunum

# Byrja bygging fyri 60-70 milliónir í Vági longu í ár

**Sjey fyritøkur bjóða seg fram at byggja ellis-og røktarheim og økisdepil fyri sinnisveik í Vági. Gongur sum ætlað, byrjar byggingin longu í ár**

ALMENN BYGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Gongur sum ætlað, verður farið undir at byggja nógv umrødda ellis- og røktarheimið og økisdepilin fyri sinnisveik í Vági, longu í ár.

Tað er greitt eftir at tilboðini upp á byggingina vórðu latin upp seinnapartin í gjár.

Tann stóra løtan var á skrivstovuni hjá Landsverki í Havn og tað vísti seg, at sjey tilboð vóru komin inn upp á byggingina.

Tilboðini fevna um allan byggikostnaðin, tað vil siga, alt tað, sum hevur við handverksarbeiðið at gera.

Men afturat hesum kostnaðinum, koma so lønar- og príshækkingar, projektering, eftirlit, innbúgv og annað.

Tað sást, at rættiliga stórur munur var á tilboðunum við tað, at heili 33,1 millión var á muni á tí bíligasta og tí dýrasta tilboðnum.

Tað var TG Verk, sum hevði bíligasta tilboðið og teir bjóða sær til at byggja stovnarnar báðar fyri 56,9 milliónir.

Tað eru arkitektarnir Albert Isfeld og Gudmund S. Hansen, sum hava teknað stovnarnar, Landsbyggifelagið stendur fyri konstruktiónunum og el arbeiðnum og Martin Leo stendur fyri hvs arbeiðnum.

### Byrja í ár

Albert Isfeld sigur, at gongur sum ætlað, verður klárt at fara undir byggingina longu ár, kanska enntá longu nú í november.

Byggingin er mett at taka tvey ár, so alt bendir á, at tað verður klárt at flyta inn í nýggju stovnarnar um ársskiftið 2010-2011.

- Grundstykkið er grivið út og tað mesta av planeringini og atkomuvegnum er gjørt, so tí ber tað til at fara undir byggingina so skjótt, sigur Albert Isfeld.

Hann er væl nøgdur við tilboðini, tí hann sigur, at tey eru, sum hann hevði væntað.

### Tilsamans 3900 fermetrar

Verkætlanin fevnir um tveir samanbygdir stovnar. Annar stovnurin er eitt ellis- og røktarheim og hin stovnurin er ein økisdepil til sinnisveik.

Tilsamans er talan um eina bygging upp á 3.900 fermetrar. Ellis- og røktarheimið skal hýsa 24 búfólkum og verður 2.500 fermetrar til støddar og økisdepilin til sinnisveik verður 1.400 fermetrar til støddar og har verður rúmd fyri verður átta búðfólkum, umframt at tað verða tvey umlætingarpláss.